

## Handilsnæmingur til Vero Moda

**Kundi tú hugsað tær starv í einum lívligum og tryggum umhvørvi, har nógv er at gera, og har tú ert partur av einum starvsfólkatoymi ið støðugt strembar eftir at mennast og gerast betri?**

Vit leita eftir ágrytnum, blíðum og tænastu sinnaðum næmingi at byrja sum skjótast.

**Førleikakrøv:**
Tú hevur lokið FHS, HH ella líknandi prógv. Tú ert sera áhugað/ur í klædnamóta og - sølu. Tú ert blíð/ur, og tænastusinnað/ur og ágrýtin. Tú ynskir at mennast, og gert tær ómak at veita eina sera góða tænastu og ert ágrýtin eftir at geva viðskiftafólkunum eitt gott heildarupplivilsi í handlinum.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og mennandi starv í einum umhvørvi har tað snýr seg um at veita eina góða tænastu samstundis sum tú hevur tað gott og stuttligt til arbeiðis.

Vørurnar, tú skalt selja, eru klæðir og tilhoyr til kvinnur og vørustreymurin gongur skjótt og væl.

Við í lærutíðini er skúli Danmark. Skúlatíðin er býtt sundur soleiðis, at tú skalt til Danmarkar í skúla 7 ferðir í tilsamans 8 vikur.

Eru spurningar til starvið ber til at ringja til Ann Mariu Nyby, tel 314164 ella 228575

Send tína umsókn við prógvum og tilmælum innan 23. januar 2009 til: Vero Moda, Box 1037, 110 Tórshavn

VERO MODA®

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Avloysari fyri skrivstovufólk

Føroya Arbeiðsgevarafelag søkir eftir avloysara til Vinnuhúsið fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi.

Arbeiðið fevnir um skrivstovuhald, skrivaraarbeiði, telefonavgreiðslu og samskifti við limir og viðskiftafólk.

**Tað er ein fyrimunur, um tú:**

- hevur hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir,
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevnir,
- dugir væl at samskifta á føroyskum,
- hevur telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit).

Løn eftir avtalu. Starvssetanin byrjar hálvan februar 2009 og heldur fram til 31. desember 2009.

Skrivlig umsókn, merkt "Skrivstovustarv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. jan 2009.

Umsóknin skal sendast til:

Vinnuhúsið
Smærugøta 9A
Postsmoga 1038
110 Tórshavn

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Maritu Rasmussen ella Belindu Lilaa á tlf. 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá sjey arbeiðsgevarafeløgum og 11 vinnufeløgum, og í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini. Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og politiskari ávirkan. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum. Sí eisini www.industry.fo.

**Hvønn dag í januar mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.**

**Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**

**Sendið okkum loysnina innan mánadagin 9. februar 2009 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.**

**Vinningur í september er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304,-**

**Drigið verður í viku 7.**

**Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.**



# SUDOKU

## JANUAR-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 3 | 1 | | | 6 | | |
| 1 | | | | | | | 4 | 7 |
| 5 | 8 | | | | | | | |
| | 2 | | 6 | | | 5 | | 8 |
| | | | 2 | | 3 | | | |
| 4 | | 1 | | | 8 | | 6 | |
| | | | | | | | 9 | 1 |
| 7 | 5 | | | | | | | 6 |
| | | 4 | | | 2 | 7 | | |

ATLANTIC AIRWAYS

**Navn:**____________________

**Bústaður:**____________________

**Telefon:**____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

**Vinningurin í januar**

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

Sosialurin